Ken Nónklett, kanningarstjóri
Sundsvegur 15
FO-100 Tórshavn

Tórshavn, 17. mai 2023
J.nr. 13539

**Viðv. kanningarfrágreiðing um avgerðir, tiknar av landsstýrismanninum í fiskivinnumálum sambært § 49 í sjófeingislógini í 2020 og 2021**

Vegna Jacob Vestergaard, sum hevur fingið útkast til kanningarfrágreiðing sendandi til møguligar viðmerkingar, skulu vit koma við viðmerkingum til útkastið.

Kanningarstjórin staðfestastir, at landsstýrismaðurin tilvitað hevur drálað við at luta út kvotur í 2020. Mett verður ikki, at landsstýrismaðurin hevði sakligar orsøkir at drála við málinum, men at orsøkin var politisk, tvs. at ynski er um at fáa nýggjar aktørar inn við skipi, og tað heimilaði lógin ikki tá. Slíkt drál verður ikki mett í samsvari við góðan fyrisitingarsið. Umsøkjarnir í 2020 hava ikki kunnað havt tað neyðuga álitið á almennu umsitingina, soleiðis sum meginreglan um góðan fyrisitingarsið áleggur almennum myndugleikum.

Tí kemur kanningarstjórn til ta niðurstøðu, at landsstýrismaðurin við ikki at hava avgreitt umsóknirnar og lutað út kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2020, hevur brotið óskrivaðu aðalregurnar um góðan fyrisitingarsið.

Eisini verður góður fyrisitingarsiður mettur at vera brotin, tá umsøkjarar frá august 2020 ikki fingu svar fyrr enn 27. mai 2021, tó at hesin parturin ikki elvir til, at brot á løgtingslóg nr. 90 frá 4. juni 1996 um ábyrgd landsstýrisins verður staðfest.

Í framhaldi av hesum konkluderar kanningarstjórin, at drálið at avgreiða umsóknirnar um kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2020 er í stríð við § 5, stk. 1, í lógini um ábyrgd landsstýrismanna, tí landsstýrismaðurin tilvitað framdi brot á reglurnar um góðan fyrisitingarsið.

Sambært kanningarsetninginum snýr málið seg um útluting av fiskirættindum sambært § 49 í sjófeingislógini í 2020 og 2021. Um komið verður fram til, at viðgerðin av útlutanini ikki hevur verið nøktandi, er kanningarstjórin biðin um at meta, hvørt talan kann vera um brot á lógina um ábyrgd landsstýrismanna.

Sum gjøgnumgongdin av málinum vísir, bleiv steðgað á at avgreiða umsóknirnar í 2020 um kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir, tí politiskt bleiv viðgjørt frá ársbyrjan og langt út á heystið í 2020, hvat kvoturnar ella puljan at útluta eftir § 49, stk. 1., skuldi brúkast til. Lógin rakti sostatt ikki tað, sum politiska ynskið hjá samgonguni legði upp til og ein lógarbroyting var á veg til sjófeingislógina, sum kundi fáa týdning fyri útlutanina av kvotum.

Einki er ávíst um, at landsstýrismaðurin í sambandi við, at tað dregur út at avgreiða málini í 2020 hevur lagt ósaklig atlit til grund, men politiskt er man komin eftir, at regluverkið ikki er soleiðis, sum ynskiligt er, ella sum ætlað var í mun til samgonguskjalið. Tí verður mett um, hvat gerast kann, og tá ið nakað er fráliðið, verður komið fram til, at stig verður tikið til at broyta lóggávuna.

Sum embætisfólkið hjá landsstýrismanninum eisini hevur víst á, var einasti rætti háttur at handla, um galdandi lóg elvir til óynskilig ella óheppin úrslit, at taka stig til at broyta galdandi lóg. Tað var júst hetta, sum Jacob Vestergaard gjørdi við at leggja uppskot fyri tingið um broyting í lóg um sjófeingi, løgtingsmál 69/2020. Tað var síðan hetta, sum løgtingið tók undir við, tó at materiellu reglurnar í § 49 ikki blivu broyttar í tí umfarinum.

Hóast umsóknir vóru innkomnar, so kunnu omanfyri nevndu viðurskifti ikki sigast at vera ósakligt ella óviðkomandi at leggja dent á hjá einum landsstýrismanni, sum m.a. hevur til uppgávu at røkja lógarverkið og taka stig til neyðugar broytingar. Harvið ber heldur ikki til at konkludera, at goður fyrisitingarsiður er brotin, um avgreiðslan av umsóknunum á hesum grundarlagnum bleiv útsett og síðan mátti ganga umaftur, tá lógin bleiv broytt.

Bleiv lógin ikki broytt, so hevði landsstýrismaðurin framvegis møguleika at avgreiða umsóknirnar í 2020, hóast tað var liðið langt út á árið.

Málsgongdin vísir, at vit eru ikki bara í einum fyrisitingarligum hølpi, har atlit skal havast til fyrisitingarrætt v.m., men á einum markamóti millum fyrisiting, politik og lóggávusmíð. Tá ber ikki lætt til at siga, hvat er reglugrundarlagið, ið landsstýrismaðurin skal hava brotið. Tað er undir øllum umstøðum ógreitt, um idealið um góðan fyrisitingarsið yvirhøvur er so greið rættarkelda, at ein kann tala um at bróta hesa á ein slíkan hátt, at tað aftur elvir til brot á lóg um ábyrgd landsstýrisins.

Á síðu 32 og 33 skrivar kanningarstjórin, at lógaruppskotið um at broyta sjófeingislógina, m.a. § 49, og um at heimila, at kvotur frá 2020 blivu fluttar til 2021 (LM-69/2020), í roynd og veru fær afturvirkandi virknað, tí umsøkjarar hava latið inn umsókn í august 2020 hesi verða beinleiðis rakt av broytingaruppskotinum, sum løgtingið samtkyti 18. desember 2020. T.v.s. umsøkjarar sum søkja um kvotu í 2020 eftir tágaldandi § 49, stk. 1, fáa ikki umsóknirnar viðgjørdar, men fáa heldur í boði at søkja aftur í 2021, men nú við broyttum treytum, tí § 49, stk. 1, er broytt.

Til hetta er fyrst at siga, at talan er ikki um afturvirkandi gildi – hvørki formelt ella reelt.

Tað er kendur lutur, at lógarbroytingar, sum eru framatrættaðar, í skiftisreglum kunnu fyrihalda seg til, hvussu farast skal fram í mun til mál, sum ikki eru avgreidd, tá ið lógarbroytingin kemur í gildi. Dømi eru skiftisreglur, har mál, sum ikki eru viðgjørd liðugt, skulu viðgerast víðari eftir tágaldandi reglum, men dømi er eisini um tað øvugta, ella at onki er ásett í skiftisreglu. Er ongin skiftisregla, skulu innkomnar umsóknir, sum ikki eru avgreiddar, vanliga avgreiðast eftir galdandi rætti, t.v.s. eftir teirri lóg, sum er í gildi, tá ið avgerð verður tikin. Í so máta er einki løgið við lógarbroytingini, sum bleiv samtykt av tinginum 18. desember 2020.

Í framhaldi av hesum meti eg ikki tilvísingina til rundskrivið um lógarsmíð og góðan lóggávusið viðkomandi, tí talan er ikki um afturvirkandi virknað.

Hartil kemur, at afturvirkandi virknaður formliga ber til, og einki skeivt ella ólógligt er í tí, hóast tað rættarpolitiskt og praktiskt kunnu vera atfinningar móti afturvirkandi virknaði.

Tá kanningarstjórin á síðu 34 kemur til ta niðurstøðu, at avgerðin um at útseta útlutanina av kvotum eftir § 49, stk. 1, í 2020 til 2021 ikki er í samsvari við góðan lóggávusið, so skal eisini verða viðmerkt, eins og kanningarstjórin sjálvur ger vart við, at tað sjálvandi er løgtingið, sum samtykkir lógirnar. Í framhaldi av hesum konkluderar kanningarstjórin, at landsstýrismaðurin tí ikki hevur framt brot á sjófeingislógina við ikki at luta út í 2020. Í hesum sambandi skal undirritaði tó vísa á, at tá kanningarstjórin tekur hetta evni upp og problematiserar gongdina, so er kortini ikki ávíst nakað juridiskt grundarlag fyri at finnast at landsstýrismanninum í mun til at taka stig til at fáa lóggávuna broytta. Hetta átti at framgingið greiðari, tí lesarin fær eina fatan av kritikki (sum kortini ikki kann vendast móti landsstýrimanninum).

Tá kanningarstjórin aftur staðfestir, at landsstýrismaðurin tilvitað hevur drálað at luta kvotur út í 2020, uttan at hava sakligar orsøkir til hetta, so verður víst til, at orsøkin til drálið er beinleiðis politisk í mun til ynskið um at fáa nýggjar aktørar inn við skipi, og tað heimilaði lógin ikki. Síðani verður staðfest, at slíkt drál ikki kann metast at vera í samsvari við góðan fyrisitingarsið.

Eg meti her ikki, at hugtakið góður fyrisitingarsiður verður nýtt rætt. Atlit má her verða havt til, at vit eru á markamótinum millum politikk og løgfrøði/fyrisiting, og at ein landsstýrismaður javnt og samt eigur og kann hava eyguni eftir, um regluverkið er innrættað á nøktandi og ynskiligan hátt. Er tað ikki tað, so hevur hann rætt til at taka stig til at fáa hetta broytt. Tá ber ikki til at siga, at landsstýrismaðurin eltir ósaklig atlit, um hann tekur stig til lógarbroyting ella fyriheldur seg til lógarbroyting, ið er í umbúnað.

Einki liggur heldur í skipanini í mun til, at landsstýrismaður er tvungin at avgreiða innkomnar umsóknir beinanvegin á galdandi lógargrundarlagi, um ein lógarbroyting er ávegis ella ætlað.

Hóast kanningarstjórin hevur rætt í, at tað vanliga ikki er í tráð við góðan fyrisitingarsið, um tað tilvitað verður drálað við at viðgera eina umsókn, eins og tað kann vera brot á góðan fyrisitingarsið ikki at svara einari umsókn, fyrr enn long tíð er fráliðin, so ber ikki til á tí grundarlagnum at konkludera, at viðgerðin av umsóknunum ikki hevur verið fullgóð, t.v.s. ikki fullgóð í týdninginum av, at hetta kann vera brot á lóg um ábyrgd landsstýrismanna.

Kanningarstjórin kemur til ta niðurstøðu, at tá landsstýrismaðurin valdi at bíða við at avgreiða umsóknirnar, so er samstundis talan um tilvitað brot á óskrivaðu fyrisitingarrættarligu reglurnar um góðan fyrisitingarsið. Slík kobling kann ikki gerast mekaniskt.

Hóast tú subjektivt er tilvitaður um, at viðgerðin ikki verður avgreidd vegna omanfyri nevndu viðurskifti og ætlaða lógarbroyting, so er tað ikki tað sama sum, at man er tilvitaður um, at onkur normur ella regla verður brotin, sum ein kann ábyrgdast fyri. Grundleggjandi kravið fyri at koma undir ábyrgd er einfalt ikki til staðar einans við at vísa á, at drálið var tilvitað.

Her er eisini viðkomandi at hava atlit til, at tíðin, sum leið meðan ongin avgerð bleiv tikin, objektiv var avmarkað. Umsóknirnar komu inn til 10. august og tilmælið frá fyrisitingini fyrilá 15. september, og lógin verður broytt 18. desember grundað á uppskot, ið er framlagt 9. desember 2020. Hetta sæst tó ikki vera viðgjørr av kanningarstjóranum.

Á s. 142 verður konkluderað, at talan er um brot á § 5, stk. 1, í lóg um ábyrgd landsstýrismanna, tá brot er framt á reglurnar um góðan fyrisitingarsið. Hesum eri eg ikki samdur í.

Í fyrra lagi er hetta tí, at einki brot á materiella lóggávu er staðfest – hvørki fyrisitingarlóg ella sjófeingislóg. Hartil snýr fyrisitingarsiðir seg um tey meira vegleiðandi/uppalandi atlitini, sum ein fyrisiting skal halda seg til og arbeiða eftir, men brot á hesar meginrelgur kunnu vanliga ikki í sjálvum sær elva til, at talan tá eisini er um lógarbrot. Tá skal okkurt annað og meira álvarsligt til.

Eftir § 5, stk. 1, kann ein landsstýrismaður koma undir ábyrgd, um hann tilætlað ella av grovum ósketni brýtur tær skyldur, sum liggja á honum sambært lóggávuni. Í hesum sambandi er viðkomandi, at eingin formlig freist er farin og eingin hevur verið fyri vanbýti ella mist rættindi. Tá landsstýrismaðurin leggur lógaruppskotið um broyting í sjófeingislógini fyri tingið 9. desember 2020, hevði hann enn kunnað avgreitt umsóknirnar, um uppskotið ikki vann frama í tinginum.

Sum kunnugt bleiv uppskotið um at broyta sjófeingislógina samtykt tann 18. desember 2020 við stórum meiriluta. Harvið er materiella grundarlagið intakt, og landsstýrismaðurin hevði fulla heimild til at fáa flutt kvoturnar yvir um til 2021. Harvið hevur løgtingið eisini góðkent ta mannagongd, sum hevur verið fylgd í Fiskimálaráðnum í 2020, eisini hóast 4 av nevndarlimunum í Vinnunevndini hjá løgtinginum talaðu at, at umsóknirnar ikki vóru avgreiddar í 2020.

Tá soleiðis er verður eisini mett, at tað ikki ber til at staðfesta nakað brot, eins og tað ikki gevur ikki meining at skula samtykkja uppskot til samtyktar um at geva fyrrverandi landsstýrismanninum eina átalu fyri viðurskifti, sum løgtingið á upplýstum grundarlagi viðgjørdi og góðkendi longu í desember 2020.

Kanningarstjórin hevur heldur ikki viðgjørt og ávíst, um ella hvussu óskrivaða hugtakið um góðan fyrisitingarsið er partur av gerningsinnihaldinum í § 5, stk. 1, í lóg um ábyrgd landsstýrismanna, sum annars er ætlað úttømandi at áseta treytirnar fyri landsstýrismannaábyrgd.

Heldur ikki hevur kanningarstjórin viðgjørt ella ávíst, hvussu komið verður fram til, at brot á góðan fyrisitingarsið í mun til avgreiðslu av umsóknum í 2020, ella manglandi kunning til umsøkjararnar, skal vera av slíkum karakteri ella grovleika, at hetta kan subsummerast til lóg um ábyrgd landsstýrismanna, § 5, stk. 1, sum brot á tær skyldur, sum liggja á landsstýrismanninum.

Á síðu 142 kemur kanningarstjórin í stuttari umrøðu til ta niðurstøðu, at grundarlag ikki er fyri at reisa revsimál mótvegis landsstýrismanninum, við tað at løgtingið hevur samtykt at broyta sjófeingislógina, soleiðis at kvotur kundu flytast til 2021, og síðan verður víst verður til kanningarstjórafrágreiðingina frá Hans Gammeltoft Hansen frá 2015.

Til hetta er at viðmerkja, at tá tað ikki er grundarlag fyri at koma til ta niðurstøðu, at omanfyri nevndu viðurskifti kunnu lýsast sum brot á góðan fyrisitingarsið, so er enn minni grundarlag fyri at konkludera, at slík viðurskifti kunna elva til, at mál um revsing verður reist móti landsstýrismanninum. Grundgevingin er hon, at talan er um tær óskrivaðu fyrisitingarligu meginreglurnar, sum ikki eru at líkna við lóggáva.

Møguligt brot móti hesum aðalreglum kann tí heldur ikki uttan víðari verða rakt av nakrari revsiáseting, heldur ikki í lóg um ábyrgd landsstýrismanna § 5, stk. 1.

Heldur ikki er nakað grundarlag fyri at stigbenda ta átalu, sum mælt verður til, soleiðis at tað er ein átala og ikki ein álvarslig átala (ella okkurt annað). Hetta er umboðsmansretorikkur, sum eg ikki meti, at ein kanningarstjóri kann ella eigur at fáast við, og sum hartil formliga fellur uttan fyri tann kanningarsetning, sum er givin tann 3. mars 2022.

Samanumtikið skal verða víst á, at tá eingin formlig lóg er brotin, ber sum meginregla ikki til at koma undir ábyrgd ella ábyrgd landsstýrismanna, § 5, stk. 1.

Møguligt brot á óskrivaðu meginreglurnar um góðan fyrisitingarsið, í hesum føri við at steðga á við viðgerð av nøkrum umsóknum tí lóggávan skuldi broytast, er ikki slíkt, at sigast kann, at talan er um álvarslig viðurskifti, sum ein landsstýrismaður kann revsast fyri, við tað at hann tilætlað ella av grovum ósketni skúgvar til viks skyldurnar, sum liggja á honum sambært løgtingslóg um Stýrisskipan Føroya, sambært lóggávuni ella sambært starvsinnihaldi hansara.

Kanningarstjórin hevur í hesum sambandi hvørki víst á, hvussu møgulig brot á góðan fyrisitingarsið kunnu sammetast við brot á lóggávuna, ella hvussu brot á góðan fyrisitingarsið í ítøkiliga førinum kann sammetast við at skúgva til viks tær skyldur, sum liggja á landsstýrismanninum sambært starvsinnihaldi hansara. Víst verður eisini til brotið niðast á s. 3 í hesum skrivi um sama.

Í framhaldi av omanfyri standandi verður mælt til, at tann parturin av frágreiðingini, sum er um metingar um brot á góðan fyrisitingarsið, verður broyttur, og at atlit verður tikið til tey serligu viðurskiftini, sum gera seg galdandi í virkisøkinum ímillum politikk og løgfrøði, og har løgtingið eftirfylgjandi hevur góðkent mannagongdina við at broyta sjófeingislógina 18. desember 2020.

Í framhaldi av hesum eigur parturin um brot á § 5, stk. 1, í lógini um landsstýrismanna og um kritikk til landsstýrismannin at verða umorðaður soleiðis, at tað ikki verður staðfest nakað brot á § 5, stk. 1, og at kritikkviðmerkingarnar annars verða tiknar úr frágreiðing kanningarstjórans.

Vinarligast

Eyðbjørn Larsen, adv.
eyl@sokn.fo